# Ætlar at vinna HM

Fabio Capello er ikki í iva. Ongland hevur møguleika at vinna HM-heitið í fótbólti í 2010, og tað er hetta, sum er málið hjá honum, nú hann setur seg í heta enska landsiðsvenjarasessin. – Trúi eg ikki sjálvur uppá, at vit kunnu vinna HM, so skuldi eg heldur slappa av á golfbreytini. Eg kundi sjálvandi bara tikið mær av løttum, men eg hevði brúk fyri eini avbjóðing. Og tú finnur valla nakra størri avbjóðing, enn at skula lyfta Ongland upp á heimstindarnar, sigur Capello.



# Yvirhálaði Henry

Fýra ár á rað er Thierry Henry kosin sum ársins franski spælari. Men sunnudagin varð hann yvirhálaður av 24 ára gamla Frank Ribery. Ribery, sum spælir í Bayern Munchen, hevur verið ein av avgjørt størstu profilunum í bundesliguni hetta kappingarárið. Í atkvøðugreiðsluni gjørdist Thierry Henry nummar tvey. Karim Benzema úr Lyon gjørdist nummar trý.




*Hóast freistin varð longd, so er knúturin kring sponsos-nøvnini enn ikki loystur. Men nú sessast Kringvarpið og ÍSF so aftur vi ðsamráðingarborðið*

*Tilgjørd mynd: Álvur Haraldsen*

# Kringvarpið fær longda freist

**Samskifti er aftur millum Kringvarpið og ÍSF um rættindi at senda frá ítrótta-hendingum. Misskiljing var orsøk til slitið, sigst, men enn sum áður er tað orðingin í grein fýra í sáttmálanum, sum er knúturin**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani á heysti 2005 hevur kuril verið á tráðnum millum Kringvarpið og ÍSF. Í oktober mánaði ta ferðina skrivaðu vit, at vandi var fyri, at ítrótturin kundi hvørva úr Kringvarpinum, tí Kringvarpið noktaði at geva seg undir treytirnar hjá ÍSF. Hetta tí ÍSF vildi hava staðfesta í nýggjan sáttmála, at Kringvarpið bindur seg til at nýta sponsor-nøvn, tá kappingar bera hesi. Eitt nú við Sunset-kappingini, Atlantic Airways-kappingini, Formula-deildini v.m.

Eftir drúgvar samráðingar endaði trætan ta ferðina við eini orðing, har Kringvarpið sigur seg vilja nýta hesi heiti, í tann mun hesi eru »hóskilig og náttúrlig«, sum tikið varð til.

»Hóskiligt og náttúrligt« var tað tó ikki í eins stóran mun, sum ítrótturin ynskti tað, og tí vildi ÍSF hava orðingina strammaða upp, tá nýggjur sáttmáli skuldi gerast ístaðin fyri tann, sum gekk út 31. desember í fjør.

Fleiri samráðingar hava verið á skránni, men seinasta vikuskiftið fleyt bikarið yvir hjá ÍSF, sum sendi skriv til Kringvarpið, har tað varð staðfest, at sáttmálin varð sagdur upp frá 15. desember at rokna.

Í skrivinum staðfesti ÍSF, at tað vóru fleiri viðurskifti, sum partarnir ikki vóru samdir um, men hetta tykist nú byggja á eina misskiljing. Í øllum førum segði Kringvarpsstjórin við Sosialin, at sær kunnugt snúi stríðið seg bert um tí einu regluna, og hetta varð meira ella minni váttað av ÍSF fríggjadagin.

Tá høvdu partarnir nevnliga fund, og tó at hesin ikki gava nakran endaligan sáttmála, so samdust partarnir um at halda gongd í samráðingunum, og tí verður enn virkað eftir sáttmálanum, sum gekk út í fjør.

## Sami knútur

Tað nertir tó ikki tann veruleika, at gordiski knúturin í samráðingunum er nýtsla av sponsornøvnum. Higar til siga báðir partar hava givið seg heilt nógv, men fyri báðar tykist spurningurin um sponsor-nøvn at vera kardinalpunktið. Hetta tí ÍSF vil tryggja sær, at nøvnini altíð verða nevnd, meðan Kringvarpið hinvegin sigur, at ein slík áseting er beinleiðis í stríð við Kringvarpslógina. Hetta tí lógin ásetur, at greiður skilnaður skal vera millum redaktionelt innihald og lýsingar.

Eftir øllum at døma, so er stóri trupulleikin í hesum, at ÍSF sum so ikki hevur nakran blanko-kekk við til samráðingarnar. Talan er nevnliga um høvuðssáttmála, sum hvørt sersamband í sínum lagi síðani skal góðkenna. Við øðrum orðum vil tað siga, at hóast ÍSF og Kringvarpið gera nýggjan sáttmála, so gevur hesin ikki av sær sjálvum rættindi at senda frá øllum ítróttatiltøkum.

Ein hugsandi støða er, at ÍSF góðkennir verandi orðingina hjá Kringvarpinum, men at ávís sersambond ikki gera tað. Við øðrum orðum kann felagsskapurin tá koma í ta støðu, at ein sáttmáli er undirskrivaður við Kringvarpið, men at Kringvarpið als ikki fær ta avtalu, sum roknað varð við.

Fyribils er hóttanin um at taka ítróttin úr Kringvarpinum tó slept. Men knúturin er altso enn tann sami, nú partarnir aftur hava avtalað at sessast við samráðingarborðið.

# Besti unglingin í Europa

**Pál Joensen karvaði 14 sekund av føroyska metinum, tá hann leygardagin svam seg upp á europisku tindarnar**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við einum samlaðu 12. plássi í europiskumeistarakappingini á stuttbana fekk Pál Joensen eitt framúr úrslit leygarmorgunin. Í B-finaluni á 1.500 metrum svam hann á leið 14 sekund undir føroyska metið hjá sær, og kom soleiðis á mál við tíðini, 15.10,02. Hetta er samstundis skjótasta tíðin, sum junior-svimjari hevur svomið í Europa í ár, og er avrikið nóg mikið til at geva Pál 881 fina-stig á styrkislistanum. Tað eru bert fáar vikur síðani, at Elspa Mørkøre sum fyrsti føroyski svimjarin vann sær fleiri enn 800 fina-stig.

– At hann fær 881 FINA-stig, vísir hvussu góður hann er, tí teir, sum eru í heimselituni liggja um 1.000 stig. Hann nærkast elituni, so vit fáa at síggja, hvussu langt tað røkkur. Tað gongur væl hjá honum, og hann hevur ein góðan vilja, sum eisini kann føra hann langt, segði Kristian Martin Joensen, sum er við Páli í Ungarn, við Kringvarpið.

Tað eru bert tvær viku síðani, at Pál í stórum stíli vann sær trý gullmerki í NM-kappingini í svimjing. Á 1.500 metrum var hann tá heili 30 sekund framman fyri næsta svimjaran. Og nú hevur hann altso betra tíðina frá teirri ferðini við 14 sekundum.



*Favoritturin til heiðurin fyri ársins ítróttaavrik flutti enn ein stóran marknastein, tá hann um vikuskiftið svam bestu junior-tíðina í Europa í ár*